<u>**Uppskot til broyting av ásetingunum fyri D-neystaøkir í byggisamtyktini**</u>

**Runavík , Saltangará og Glyvrar: D5 til neyst - Lamba D6 og D9 neyst - Søldarfjørður D12, D14 og D16 neyst - Skála D18, D19 og D20 neyst, Skálafjørður D27 og D28 neyst – Æðuvík D30 Rituvík D32 og D33 neyst - Funningsfjørður D36 neyst, Elduvík D37 og D38 neyst, Oyndarfjørður D40 neyst, Funningur D42 neyst**

| | |
|---|---|
| Nýtsla | Økið verður nýtt til neyst/bátaskúrar og havnarlag í sambandi við hetta.<br>Bygging kann bert fara fram eftir útstykkingarætlan, sum fevnir um alt økið.<br>Skjøldrar skulu vera millum 4,5 og 6,5m breiðir útvendugt mál.<br>Longdin á neystinum/bátaskúrunum skal verða í mesta lagi 13m útvendugt mál.<br>Neystini/bátaskúrarnir skulu standa “lið um lið” við einum skjøldri móti sjónum.<br>Neyðugar gøtur kunna tó vera ímillum neystini/skúrarnar.<br>Neystini/skúrarnir skulu hava mønu eftir langsíðu og takhall millum 35° og 50°, tó vegleiðandi skal reisingin vera “trið-ingsreyst” (uml. 42°).<br>Býráðið kann geva loyvi til at innrætta frítíðarbústað omaná neyst har tað verður mett ráðiligt og treytað av, at møguleiki er at binda í góðkenda kloakk og at niðara hæddin verður varðveidd sum neyst. Eigarin av neystinum rindar allar útreiðslir í sambandi við íbinding í góðkenda kloakk.<br>Tað er ikki loyvt at hava fastan bústað í neystaøkjum. |
| Grundstykki | Min. 60 $m^2$ og í mesta lagi 85 $m^2$ |
| Nýtingarstig | Nýtingarstig: Í mesta lagi 100%<br>Hæddartal: Í mesta lagi 1 hædd<br>Bygningshædd: Í mesta lagi 4,5m frá gólvi til sill<br>Fyri D5, D14, D16 og D36 økini, kann bygningshæddin verða í mesta lagi 5,5m frá gólvi til sill. |
| Onnur viðurskifti | Neyst sum standa í øðrum økjum enn neystøkjum, kunnu, um Býráðið loyvir tí, verða viðgjørd eftir ásetingunum fyri neyst. |